## Kvinnuligur farao eyðmerktur

Egyptiskir fornfrøðingar siga seg hava endaliga úrslitið av einari DNA-kanning. Kanningin er tikin av einari mumiu, sum er funnin afturi í 1903. Leingi hevur verið gitt at hetta líkið er av drotning Hatshepsut. Hetta komst av at líkið er funnið í kongaliga dalinum í Egyptalandi. Og í dag siga egyptiskir forfrøðingar altso, at eyðmerkingin er greið, og at hetta er droting Hatshepsut.

## Teldutjóvur kostaði NASA 10 mió.

26 ára gamli Victor Faur má í hesum døgum ikki vera besti vinmaður hjá risa rúmdarfyritøkuni, NASA. Síðsta summar hakkaði hann seg nevniliga inn á heimasíðuna hjá NASA, og hetta kom at kosta fyritøkuni heilar 10. mió. kr. Teldufrøðingar hjá NASA løgdu brádliga til merkis, at heimasíðan var undir álopi av einum ella øðrum teldusnillingi. Síðan mátti niðurleggjast, og síðan uppbyggjast av nýggjum, sum kom at verða sera dýrt. – Eg havi einki strikað ella oyðilagt. Eg vildi bara vísa hvussu lætt tað var at hakka seg inná síðuna, segði Victor Faur, sum sambært løgregluni er partur av kenda teldubandanum, Whitehat Team.

# Bakkafrost tvífaldar fra





**- Nú verður øll reinskering maskinell, og við hesi linjuni, sum vit fáa aftrat og teirri tøkni, sum nú er á marknaðinum, verður framleiðsluorkan av portiónum tvífaldað, sigur Regin Jacobsen, stjóri í Bakkafrost Holding**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bakkafrost á Glyvrum verður í løtuni útbygt og umbygt. Samstundis, sum bygt verður norðureftir, verður alt tikið innan úr verandi virki, sum hevur við sjálva framleiðsluna at gera.

Tá tilbygningurin er liðugur, verður alt sett upp av nýggjum.

Endamálið við íløguni er at rationalisera og økja framleiðsluna av portiónum úr laksi.

Øll reinskering av fløkum skal nú gerast við maskinum – ella "robottum", sum stjórin í Bakkafrost Holding, Regin Jacobsen, tekur til.

Hetta kemur kortini ikki at merkja, at talið av arbeiðsfólkið verður minni, men kanska heldur størri, tí framleiðslan av portiónum verður munandi økt.

### 700 fermetrar

– Vit hava longt virkið við 30 metrum norður úr verandi bygningi, soleiðis at samlaða longdin á virkinum suður og norður verður 100 metrar tilsamans. Virkið er 25 metrar breitt, og soleiðis liggur fermetratalið í nýggja partinum av virkinum um 700.

Regin sigur, at útbyggingin kemur at merkja, at ein portiónslinja verður sett upp aftrat, soleiðis at virkið kemur at hava tvær linjur.

– Vit byrjaðu at byggja út longu í januar, men sjálv framleiðslan av portiónum hevur gingið ótarnað heilt fram til 5. juni, tá vit fóru undir at taka gamla virkið niður. Alt arbeiðið skal verða liðugt 5. august, tá framleiðslan byrjar aftur við øktari orku.

### Alt planlagt

Stjórin sigur, at felagið hevur lagt hesa út-og umbygging til rættis yvir meira enn eitt ár, soleiðis at bæði tøka, framleiðsla og søla frammanundan er lagað eftir hesum.

– Nøgdirnar av alifiski hjá okkum fara eisini at veksa, og soleiðis hava vit eisini "tímað" verkætlanina eftir hesum.

Hann vísir á, at tá arbeiðið á Bakkafrost er liðugt, verður gongdin í stuttum hon, at rávøran fer at koma inn í norðurendanum av bygninginum, harkuldagoymslan eisini verður.

– Framleiðslan byrjar soleiðis har norðuri í bygninginum. Síðan fer fiskurin suður gjøgnum húsið, og tá framleiðslan kemur suður á leið, har virkið er bygt oman úr, verður lidna vøran fryst og fer síðan til avskipingar suðureftir.

Regin sigur, at eftir útbyggingina kunnu teir taka tríggjar trailarar í senn við ráfiski har norðuri, samstundis sum tríggjar rampur eru til trailarar í bygninginum oman úr, sum koma eftir lidnu vøruni.

– Typiskt verður tað soleiðis, at tríggir trailarar koma hvønn dag við ráfiski – og tríggir trailarar fara útaftur niðanfyri suðureftir.

Hann vísir á, at einasti parturin av laksinum, sum ikki verður virkaður og seldur sum liðugtvøra, er sjálv skræðan á fiskinum.

- Alt hitt fer útaftur sum liðugtvøra, og soleiðis er talan um rættiliga smáar nøgdir av slógvi, leggur hann aftrat.